Tage Mortensen lagt taktstokkin

KÓRTÓNLEIKUR
Frits Johannesen

Sí›sta sunnudag var vaktarskifti umbor› á skútuni Danmark Radio Pigekor. Tage Mortensen, sum leitt hevur kóri› í 34 ár - veri› tess vaktarma›ur og talsma›ur, leg›i taktstokkin frá sær og rætti hann til Michael Bojesen.

Tage hevur fleiri fer›ir veri› í Føroym vi› kóri sínum. Í juni mána›i í ár var hann og helt konsertir í Havnini, Eysturoynni og Nor›uroyggjum. Hann hev›i gott samband vi› William Heinesen, og var hann í Havnini á hundra› ára degi hansara. Tá i› William Heinesen fylti 90 ár, var hann vi› DRP og sang tónleikaverk, sum Tage sjálvur hev›i skriva› yvir yrking av WH. Hann er væl fyri, tá i› hugsa› ver›ur um skaldskapin hjá William Heinesen. Hann hevur á universitetstø›i skriva› ritger› um skaldi› og skaldskap hansara.

Fyrstu fer› Tage Mortensen var í Føroyum vi› kóri var 1967. Hetta kóri› var Nordjysk pigekor. Næstu fer› hann kom, var 1970 og var hetta vi› kórinum Danmark Radio Pigekor. Hann hevur, sum sagt, veri› tess lei›ari í 34 ár og hevur sí›ani veri› fleiri fer› í Føroyum og sungi›.

1982 var hann og sang vi› børnunum í Fuglafjar›ar skúla. Hetta vóru gó›ir dagar og dámdi honum sera væl at vera ímillum børnini og hoyra natúrligan sang. Hetta var í februar, og vóru einar tvær konsertir hildnar í Fuglafir›i vi› sangkórinum og børnunum. Ikki haldi eg taki munnin ov fullan, tá i› sagt ver›ur, at hann helt, at vit áttu at gjørt gentukór á sta›num, og skuldi ta› bera heiti›: Føroyska gentukóri›. Føroyskt gentukór? Nei, hví ikki Fuglafjar›ar gentukór? So var. Sí›ani henda dag í februar 1982 hevur kóri› bori› hetta heiti›. Eitt sum dettur mær í hugan frá hesum døgum, er at Tage Mortensen var sera hugtikin av løgunum hjá Jógvani á Lakjuni. Hann brúkti or›i›: Kvasirytmir um løgini hjá honum. Frá hesum døgum er lagi› Vøkur er ver›in (or›: Mikkjal á Ryggi) sprotti›. Hetta lagi› hevur kóri› bori› fram manga fer›ir heima á landi og uttanlands. Á samkomu, sum var eftir konsertina bjó›a›i Tage Mortensen tí n‡ggja kórinum á konserfer› til Danmarkar á páskum 1983. Hesum tóku vit av og fóru avsta› á páskum ári› eftir sum gestir hjá DRP. Hetta var ein gó› fer›. Vit sungu í Keypmannahavn, Næstved, Odense, Aarhus og Aalborg. Fer›in vardi í einar 14 dagar og høvdu vit 18 konsertir á hesi fer›. Upptøka var› gjørd til Danmark Radio, hvar kóri› fekk eina rytmiskan bólk vi› bassi, gittara, klaveri og trummum at leika undir til kvasirytmirnar hjá Jógvani.

Frá hesum døgum kom Tage í samband vi› Karl Andreassen av Strondum. Hann fekk at vita, at hann kundi fleiri lestrar uttanat. Næstu fer› Tage Mortensen kom at vitja, hev›i hann bandupptakaran vi› sær og fór at vitja Karl. Tage Mortensen festi tveir lestrar á band, sum hann hevur spælt av aftur í tí danska útvarpinum. À flestu fer›um sínum var hann inni á gólvinum hjá WH, skifti or› vi› hann, tók hann uppá og hev›i sendingar um skaldi› í danska útvarpinum.

Á ymiskan hátt hevur samband veri› vi› Tage Mortensen og DRP øll hesi ár. Hann hevur fleiri fer›ir vitja› aftur, veri› dyggur í rá›um og stu›la› á ymiskan hátt vi› sínum kunnleika um tónleik.

Hann hevur t. d. veri› í London í arkivinum hjá BBC og leita eftir tónleiki fyri eins røddir. Her fann hann so nógvan tónleik, sum aldri fyrr. T. d. nevndi Tage, at her var sanniliga opratónleikur skriva›ur fyri eins røddir. Ofta hevur veri› heitt á Taga Mortensen um løg til kóri› hjá okkum. Gentukóri› úr Dan-mark radio var og vitja›i í Fuglafir›i 1990 og vóru vit og vitja›u tey aftur 1993.

Á jólakonsertini sunnudagin 3. Des. í Radiohúsinum var vaktarskifti í hesum kóri. Tage Mortensen seg›i farvæl eftir 34 ár at sta›i› vi› ró›ri› og ment hetta kór í skaldskapi og tónleiki. Hann hevur lagt sítt í hetta vala kór, bori› ta› fram vi› rótum í danskari , evropeiskari, nor›urlendskari og føroyskari mentan.. Hetta hevur ikki veri› ke›iligur sangur vi› køldum gjalum av frostbitnum hógvum. Nei, innarligur tónleikur sungin av ungum røddum í hundra›tali øll hesi ár. Esini kann leggjast afturat tí fólkaliga, so hevur kóri› ikki hildi seg aftur, tá i› klassiskur og nútí›artónleikur hevur sta›i› á breddanum.

Óførur rómur var í tí danska útvarpshúsinum sunnudagin 3. Des. Undir hesum bitum eru tr‡ kór av hesum slag - Gentukóri›, Barnakóri› og Seniorkóri› . Øll hesi tr‡ kórini sungu henda dag. Kirsten Milters leiddi barnakóri› og Tage Mortensen leiddi hini bæ›i. Michal Bojesen var eisini á pallinum vi› tveimum løgum. Lad det klinge sødt i sky og Her kommer Jesu dine små, sum hann so meistarliga hev›i lagt til rættis fyri f‡rarødda› gentukór. Ta› seinna var vi› strúkarum og solisti. Lise Tjavle var solistur, sum júst er li›ug vi› sína útbúgving í München sum oprasangari. Hon hevur í fleiri ár sungi› vi› í gentukórinum og hava nógvir gó›ir sangara trátt sínar barnaskógvar í Danmarks Radio Pigekor.

Gott samstarv hevur veri› millum Kirsten Milthers og Tage. Tey hava veri› sum stúkan og rekkjuvágin. Tage Mortensen hevur kent sær ein bága ta› sí›stu tí›ina, og hevur Kirsten veri› honum ein gó›ur stu›ul, tá i› megin ikki rakk til.

Tage Mortensen var› væl fagna›ur henda dag. Fjøld av fólki eini 1100 í tali fagna›u Tage. Blómur og gó› ynski vór›u borin fram. Ein laurberkrans fekk Tage Mortensen um hálsin og útnevndur til hei›urslim í hesum fraga kóri.

Ta› er ilt at siga, hvat var best á konsertini. Ta› sum hugtók meg mest var Vaughan Williams “Fantasia on Christmas Songs”, har øll tr‡ kórini, orkestur og solistur, Lise Tjavle, vóru vi›. Her haldi eg, at sangararnir góvu sangstjóranum eitt hjartaligt farvæl. Eitt heraklapp í ljó›i, sangi og or›um. Eitt ríkt skei› vi› sangi og tónleiki undir hesum bitum, sum rakk so ví›a, var komi› at enda.

Fólk reistust úr sati, og lógvabrestirnir gneltu í - s‡ndu manninum, sum skapt hevur eitt kór av dygd og livandi fólkamentan sítt besta vi›mæli og tøkk fái Tage Mortensen fyri øll hesi ár.

Lucia-konsert stóra undirtøku

KONSERT
Justinus Leivsson Eidesgaard

Nor›urlandahúsi› var fullsett, tá árliga Lucia konsertin var› hildin seinasta sunnudag. Hesin svenski si›ur, sum stavar heilt frá heidnari tí›, er vor›in ví›agitin um allan heim.

Konsertin í ár er eitt samstarv millum Tórshavnar Musikkskúla og Nor›streymoyar Musikkskúla.

Umframt at ganga Luciu. so spældi ein klarinetbólkur vi› 10 næmingum í aldrinum 11-12 ár. Ein bólkur vi› 42 børnum úr Tórshavnar Musikkskúla spældi eina tómamynd, samansett av dansum og sangum til jólatónleik úr ymsum londum.

At enda spældi Tórshavnar Ungdómsorkestur, har manningin er ungdómar í aldrinum 10-15 ár jólatónleik.

Árliga Luciakonsertin var› hildin fyri fullsettum Nor›urlandahúsi sunnudagin

Mynd: Jens K. Vang

Sk‡rák eitt snotiligt bla›

BLA‹ÚTGÁVA
Jústinus Leivsson Eidesgaard

Arbei›sloysisskipanin hevur givi› út eitt n‡tt nummar av bla›num Sk‡rák, i› er bla›i› hjá Arbei›sloysisskipanini. Arbei›sloysisskipanin er ein stóvnur, sum hevur ta› veldugt í hesum døgum. So at siga einki arbei›sloysi er í landinum, øll rinda til arbei›sloysisskipanina og pengarnir streyma i kassan. Ta› sæst eisini aftur í bla›num. Peningur er n‡ttur til at fáa gott tilfar og fleiri áhugaverdar greinar eru í bla›num.

Millum anna› er ein áhugaverd grein um ræ›andi stø›una, tá Elis ver›ur høvu›státturin í gerandisdegnum. Hetta er ein samrø›a vi› Helga Rasmussen, vinnupsykolog, sum grei›ir frá hvussu ta› kennist at blíva uppsagdur. Gøtuma›urin Helgi Rasmussen b‡r ni›ri, men fer›ast javnan heim at stu›la starvsfólkunum á Arbei›sloysisskipanini.



Poetiskur skipari

YRKINGASAVN
Jústinus Leivsson Eidesgaard

Absalon Absalonsen, skipari í Vági, hevur givi› út fitt yrkingarsavn, i› sn‡r seg um lívi› solei›is og solei›is. Vanligt er ikki at skriva foror› til yrkingasøvn og ta› kendist eitt sindur ræ›andi, tá høvundurin í foror›inum gevur til kennar sín alsk til máli› og ein situr eftir vi› varhuganum, at ta› er máli› sjálvt, og ikki ta› sum bylgist inni í barmi, sum fær yrkjaran at yrkja. Vit eiga so nógvar føroyingar sum duga at stava, men ikki at skriva.

Men lat tó ikki foror›i› ørkymla teg, tí inni í savninum eru fleiri flógvar yrkingar um lívi› og kenslur. Heimkoman er fjálg, hana kennir ein og hvør sjóma›ur. Stilla kvøldarløtan á sumri, vekir heit minnir her í atventini. Og so standa vit knappliga vi› ein minnisvar›a vi› Gjógv, sum r‡kur at sjóláti, dey›a, køldu grøvini, gráti og sorg.

Og so er ta› fráfer›arstundin hjá sjómanninum, sum Absalon so eymliga yrkir um. Hon er ikki altí› so løtt, men uttan fráfer› ongin heimkoma, so samband er millum yrkingarnar. Og so vaknar fø›ilandskenslan eisini í Absalon Absalonsen, d‡rar yrkingar um landi› vit eiga.

Absalon gevur Gudi hei›urin fyri skapannarverki›. Hann ivast onga løtu í hvør stendur aftanfyri alt.

Yrkingarsavni› kostar 70 krónur og fæst í bókabú›unum, sjálvsagt.